# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# SO RUKU PISA-TÍMARNIR

Tað vóru so føgur orð frá Mentamálaráðnum fyri nøkrum árum síðani, tá ákoyringarnar fyri vánaligu Pisa-úrslitini hjá føroysku fólkaskúlanæmingunum høvdu ljóðað eina tíð. Og yvirskriftirnar í bløðunum vóru áhugaverdar: »Pisa-átøk geva 10-15 nýggj størv«.

Mentamálaráðið boðaði tildømis frá, at til skúlaárið 2007/08 fóru at verða áleið 15 størv av teimum nýggju 50 lærarastørvunum, sum beinleiðis vóru úrslit av Pisa-átøkunum. Og løgtingið samtykti umfatandi broytingar í fólkaskúlalógini beint áðrenn tað fór í summarfrí í 2007. Ein týðandi broyting varð, at byrjunarundirvísingin nú verður styrkt við fleiri tímum. Næmingarnir í 1. flokki fingu tríggjar tímar afturat, næmingarnir í 2. flokki fingu somuleiðis tríggjar tímar afturat, meðan 3. flokkur fekk tveir tímar afturat.

Eykaútreiðslan av hesum var – sambært deildarstjóranum á fólkaskúladeildini – 10,6 milliónir krónur hetta skúlaárið, sum nú er.

Vit viðgjørdu eisini fólkaskúlan á hesum stað mikudagin – um at ætlanin hjá Helenu Dam á Neystabø, landsstýriskvinnu í mentamálum, um at niðurleggja smærru skúlarnar og at brúka sparda peningin til ábøtur í skúlaverkinum, varð skotin í senk.

Men tað er ætlanin at bøta um vánaliga Pisa-úrslitið so sanniliga eisini. Skúlarnir hava fingið boð um at spara. Mitt í hesum skúlaárunum skuldu skúlarnir spara tvey prosent eyka. Hetta gekk í nógvum førum út yvir vikartímar við tí úrsliti, at næmingar róku fyri vág og vind, tá lærarar høvdu forfall við øllum tí ampa, sum tað fær á undirvísingina og viðurskiftini í skúlanum annars.

Skúlar í Havn hava nú gjørt av, at komandi skúlaár verður skarvað burtur av tímunum hjá 1., 2. og 3. flokki. Tveir vikutímar frá hvørjum árgangi. Og hví verður hetta gjørt? Jú, tað er tí, at hesir tímar eru ikki lógarbundnir. Hetta eru jú »bara« tímar, sum eru lagdir oman á undirvísingina fyri at stykja




Pisaúrslitið, og tað er ikki neyðugt, tá landið er komið sær í so svára fíggjarkreppu - skilst.

**Ikki er neyðugt við góðum Pisa-úrslitum – skilst...**

Tað er ikki lætt at vera skúlaleiðsla – ella fyri tað almennur stovnsleiðari. Men tað er bæði láturligt og grátuligt, at føgur politisk ynski og átøk enda við líka so tápuligum fíggjarligum skerjingum.

Gott hevði verið, um politiski myndugleikin eisini meldaði greitt út, tá føgur átøk soleiðis aftur verða niðurlaðað til tess at vit skulu verða komin akkurát líka vítt sum sítt – fyri síðani at staðfesta, at góð Pisa-úrslit eru marglæti.




## Set alarmin 30. august

Eitt av mest tiltiknu verkunum í rocksøguni er The Wall hjá Pink Floyd. Verkið frá 1979 verður ofta umrøtt sum eitt meistaraverk, og nú kann The Wall aftur upplivast á palli.

Roger Waters, sum var partur av Pink Floyd, er høvuðsmaðurin fyri einari nýggjari uppseting av The Wall. Tann framførslan, sum kemur tættast Føroyum, er í Parkini í Keypmannahavn tann 7. mai næsta ár.

Tað verður rættiliga gravgangur eftir billettunum til The Wall í Parkini, og skalt tú tryggja tær eitt pláss, mást tú liggja fram við beinanavegin, tá tær verða settar til sølu.

Billetlugen.dk og Fona fara at selja atgongumerkini, og tey verða sett til sølu 30. august kl. 9.00 føroyska tíð. So tað ræður um at leggja ein alarm inn á telefonina ella telduna beinanvegin.

## Hans Fróði vísir rakikrem fram

Leygarkvøldið hevur Hans Fróði Hansen stóra veitslu í danska høvuðsstaðnum. Høvið er lanseringin av rakikreminum Below Your Belt, sum er til at raka sær við í neðra.

Eitt sonevnt Release Party verður í náttklubbanum Zen, sum Remee eigur og rekur. Har eru fólk boðin í veitslu fyri at markera, at vørurnar hjá Below Your Belt nú av álvara eru komnar á danska marknaðinum.

Í næsta mánaði kemur Hans Fróði til Føroya at halda líknandi veitslu á dansistaðnum Deep í Havn.



**Frælsi er ikki ein spurningur um at sleppa undan**

HØGNI HOYDAL
KJAK Á SÍÐU 10



**Vargur kemur í av nýggjum føroyskum**

UNI ARGE
TÍÐARGREIN Á SÍÐU 13

## Fólk flokkast um Haddaway

Poppsangarin Haddaway vitjar um vikuskiftið í Føroyum. Maðurin, sum er ættaður úr Trinidad, gjørdist kendur víðahvar, tá ið hann miðskeiðis í 1990'unum hittaði við sanginum What Is Love.

Haddaway hevur síðani havt aðrar sangir á hitlistanum, men stóri sangurin hjá honum er framvegis What Is Love.

Haddaway dugir annað enn at syngja og gera løg. Hann hevur eina akademiska útbúving í politikki og søgu frá Washington University, hann leggur eisini sín egna dans til rættis og skal verða góður at spæla amerikanskan fótbólt.

Komandi dagarnar vitjar Haddaway í Føroyum, her hann áður hevur verið. Seinast hann hevði framførslu á dansistaðið í Havn var veruligur gravgangur eftir atgongumerkjunum, og alt varð útselt eftir stuttari løtu.

Nú fáa fólk so aftur møguleikan at uppliva Haddaway til 90'ara kvøld í Rex leygarkvøldið.

Haddaway leggur eisini leiðina fram við í sendingini Hvonn Live, sum Rás2 sendir leygarkvøldið.



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,** sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*